Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

Ár 2011, hin 24. mai 2011 kl. 17:30 hevði Klaksvíkar Býráð fund, har hesir limir møttu:
Óli M. Lassen, Eyðun Jacobsen, Auðunn Konráðsson, Óluva Klettskarð, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, Signhild V. Joensen, Gunvá við Keldu, Jákup Skoradal, Atli S. Justinussen, Jákup F-N. Mikkelsen og Jógvan Skorheim.

2011/048.
09/00207 Farloyvi frá býráðsarbeiðnum – Hans Arne Bertholdsen, býráðslimur

Hans Arne Bertholdsen, býráðslimur, hevur í skrivi 4. mai 2011 boðað frá, at hann verður burturstaddur til 8. juni 2011. Sostatt verður næsti persónur á sambandslistanum, Jákup Skoradal, Norðoyri, at fáa fundarboð til hendan býráðsfundin.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt, og Jákup Skoradal tók sæti í býráðnum.

2011/049.
11/00434 Farloyvi 15. – 29. mai 2011 – Steinbjørn O. Jacobsen, býráðslimur

Steinbjørn O. Jacobsen, býráðslimur, hevur í skrivi 11. mai 2011 boðað frá, at hann verður burturstaddur uttanlands í døgunum 15. til 29. mai 2011, og biðjur í tí sambandi um farloyvi, og at varalimur sín fær fundarboð til hendan býráðsfundin at møta fyri seg.
Næsti persónur á tjóðveldislistanum, Jórun Høgnesen, Klaksvík, er ikki tøk til fundin, og verður tað tí Eyðun Jacobsen, Svínoy, sum fær fundarboð.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt, og Eyðun Jacobsen tók sæti í býráðnum.

2011/050.
11/00412 Roknskapur 2010 og protokoll, kommunuroknskapur

Fíggjarnevndin mælir á fundi 18. mai 2011 býráðnum til at góðkenna grannskoðaða ársroknskapin fyri 2010 við tilhoyrandi grannskoðanarprotokoll.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/051.
11/00115 Spælipláss í Víkunum setast í nýtiligan stand – *1. viðgerð*

Í skrivi, dagfest 8. apríl 2011, greiðir mentanarleiðarin frá, at játtanin til spælipláss/sparkivallir er bert kr. 20.000,-. Umsiting av spæliplássum hoyrir vanliga undir býargartnaran – men her er ikki so lætt at gera so stórt arbeiði við teirri avseting, hann ræður yvir.

Tilmæli: Bert við játtanini til býarfríðkan/býargartnaran verður torført at fremja hesa ætlan.

1- Um mentanarøkið kanska skuldi hjálpt til, so kundi *kanska* verið tikið av Stadionøkinum ein minni upphædd til endamálið. Hetta verður nevndin at taka avgerð um og upphædd.
2- Tó vildi mentanarleiðarin mælt til, at tekniska økið eisini játtaði serskilt til verkætlanina Spæliplássið í *Víkunum*. Hetta verður nevndin at taka avgerð um, av hvørji konto og upphædd.

Á fundi 12. apríl 2011 gjørdi Tekniska Nevnd hesar samtyktir:
Ein meiriluti í nevndini: Óli M. Lassen, Óluva Klettsgarð, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur og Jógvan Skorheim, mælir til, at spæliplássið í Víkunum verður sett í nýtiligan stand, og at byrjað verður í mai mánað 2011.
Mælt verður til at peningur verður tikin frá hesum kontum til spæliplássið:
Stadionøkið kr. 20.000,-
Tekniska økið kr. 30.000,- av vegir rakstur
Býarfríðkanin kr. 30.000,-
Nevndin er samd um, at spæliplássið í Víkunum verður tað fyrsta spæliplássið, sum verður dagført, og mælir til at kr. 150.000 verða avsettar á kontu til sparkivallir/spælipláss á fíggjarætlanum komandi árini.
Ein minniluti: Hans Arne Bertholdsen, mælir til, at peningurin verður settur av á fíggjarætlan fyri 2012 og komandi árini til eina heildarætlan fyri spælipláss í kommununi

Mentanarnevndin tók á fundi 13. apríl 2011 undir við meirilutatilmælinum í Teknisku Nevnd 12. apríl 2012.

Tekniska Nevnd hevði málið til kunning 10. mai 2011.

Mentanarnevndin hevði málið til kunning 11. mai 2011.

Fíggjarnevndin tók á fundi 18. mai 2011 undir við meirilutanum í Teknisku Nevnd 12. apríl 2011 og Mentanarnevndini 13. apríl 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/052.
<u>09/00805 Vakstrarbólkur – tilmæli</u>

Í skrivi, dagfest 6. mai 2011, tekur mentanarleiðarin saman um arbeiðið hjá vakstrarbólkinum, sum arbeiddi út frá høvuðsspurninginum: Hvussu fáa vit vøkstur í kommununi?

Í samráð við Suna Poulsen frá MarketMinds varð hetta endaliga niðurstøðan.
1 – at raðfesta hvørjar uppgávur kommunan fyrst skal fara í holtur við
a) Áseta tíðarætlan, sum greinar tær verkætlanir, ið koma sum 1; 2; 3; etc.
b) Hvussu fáa vit ferðavinnuna/upplivingar við
c) Hvussu fáa vit vinnuna við
2 – at ein ábyrgdarpersónur í umsitingini arbeiðir við ”Alternativar íbúðir” – finna gongdar leiðir og fáa greiðu á møguligar neyðugar lógarbroytingar
3 – at ein persónur verður settur at arbeiða við ”Upplivingarvinna”
4 – at ein persónur verður settur at arbeiða við ”fleiri akademisk størv í sjóvinnuni”

5 – at ”Mentanarhús” verður framt eftir tí lagda leisti og umvegis tann bólk, sum settur er til hesa uppgávu.

Byggi- og Býarskipanarnevndin tekur á fundi 9. mai 2011 undir við tilmælinum frá Mentanardeildini, dagfest 6. mai 2011.

Havna- og Vinnunevndin hevði málið til kunning tann 10. mai 2011.

Tekniska Nevnd tók á fundi 10. mai 2011 undir við viðtøkuni hjá Byggi- og Býarskipanarnevndini, dagfest 9. mai 2011.

Sosiala Nevnd tók á fundi 11. mai 2011 undir við leistinum (niðurstøðuni) frá umsitingini, dagf. 6. mai 2011.

Mentanarnevndin tók á fundi 11. mai 2011 undir við tilmæli frá mentanardeildini, dagf. 6. mai 2011.

Ferðslunevndin tók á fundi 12. mai 2011 undir við Mentanarnevndini, dagf. 11. mai 2011.

Fíggjarnevndin tók á fundi 18. mai 2011 undir við Byggi- og Býarskipanarnevndini 9. mai 2011, Havna- og Vinnunevndini 10. mai 2011, Teknisku Nevnd 10. mai 2011, Sosialu Nevnd 11. mai 2011, Mentanarnevndini 11. mai 2011 og Ferðslunevndini 12. mai 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/053.
11/00403 Ung í Arbeiði 2011 – *1. viðgerð*

Í skrivi, dagfest 6. mai 2011, vísir sosialdeildarleiðarin til avtalu millum nevndarformenninar um at seta pening av til “Ung í arbeiði” eftir hesum býti:

Havna- og Vinnunevndin	kr. 50.000,-
Ferðslunevndin	kr. 50.000,-
Mentanarnevndin	kr. 30.000,-
Sosiala Nevnd	kr. 50.000,-
Tekniska Nevnd	kr. 50.000,-
Samanlagt	kr. 230.000,-

Víðari verður mælt til, at Húsið umsitur verkætlanina, og at flyta upphæddirnar frá ymisku dimensiónunum til nýggja dimensión, sum eitur "Ung í arbeiði" undir "Børn og ung".

Havna- og Vinnunevndin mælti á fundi 10. mai 2011 til, at tær 50 túsund krónurnar verða tiknar av kontuni til ymiskt, vísandi til mál nr. 11/00227. Regulering av fíggjarætlan 2011, Klaksvíkar Havn.

Tekniska Nevnd mælti á fundi 10. mai 2011 til, at peningurin hjá Teknisku Nevnd, kr. 50.000,-, verður tikin av kontuni til “Vegir, íløga”.

Sosiala Nevnd tók á fundi 11. mai 2011 undir við skrivinum frá umsitingini, dagfest 6. mai 2011, tó við tí broyting at kr. 70.000,- verða tiknar av sosiala økinum ístaðin fyri kr. 50.000,- Peningurin verður tikin av játtanini hjá Virkishúsinum.

Mentanarnevndin tók á fundi 11. mai 2011 undir við tilmæli frá Sosialu Deild 6. mai 2011 – Nevndin vísir á, at kr. 30.000,- eru settar av til endamálið á mentanarøkinum.

Ferðslunevndin tók á fundi 12. mai 2011 undir við, at nevndin letur kr. 50.000,- til verkætlanina, og at peningurin verður fíggjaður av kontubólkinum hjá Ferðslunevndini.

Fíggjarnevndin tók á fundi 18. mai 2011 undir við Havna- og Vinnunevndini 10. mai 2011, Teknisku Nevnd 10. mai 2011, Sosialu Nevnd 11. mai 2011, Mentanarnevndini 11. mai 2011 og Ferðslunevndini 12. mai 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/054.
11/00373 Húsa Kommuna – Samsktarv um dagrøkt við Klaksvíkar Kommuna

Í skrivi frá barnaansingarsamskiparanum, dagfest 26. apríl 2011, verður greitt frá, at Húsa Kommuna hevur sent kommununi skriv við fyrispurningi um samstarv í samband við, at Húsa Kommuna hevur ætlanir um at seta ein dagfrøktara í starv.

Mælt til at ganga umbønini frá Húsa Kommunu á møti við hesum treytum:

- at góðkenning fæst frá Mentamálaráðnum til stovnsetan av dagrøkt á Húsum, sum verður umsitin av kommunalu dagrøktini í Klaksvíkar Kommunu.
- at setan av dagrøktara á Húsum er í samsvar við galdandi reglur fyri dagrøktarar í Klaksvíkar Kommunu. Hædd eigur at verða tikin fyri, at tað kunnu verða viðurskifti í eini lítlari kommunu, sum gera, at okkurt má skipast øðrvísi. Tó má hetta altíð vera innan fyri lógarinnar karmar.

Somuleiðis verður mælt til, at umsitingin í Klaksvíkar Kommunu tekur ein kunnandi fund við umboð fyri Húsa Kommunu um ymisk viðurskifti, sum hava við dagrøkt/barnaansing at gera.

Sosiala Nevnd tók á fundi 11. mai 2011 undir við tilmælinum frá umsitingini, dagfest 26. apríl 2011.

Fíggjarnevndin tók á fundi 18. mai 2011 undir við Sosialu Nevnd 11. mai 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/055.
<u>11/00160 Uppskot um umskipan av skúlabygnaði í Klaksvík</u>

Í sambandi við at Mentamálaráðið mælir til, at Skúlin á Ziskatrød og Skúlin við Ósánna verða lagdir saman undir eina leiðslu, hevur samskifti og fundir verið millum partarnar í málinum, og er málið nú lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið til prinsippiella støðutakan til spurningin.

Á fundi 12. mai 2011 gjørdi Mentanarnevndin hesar samtyktir:
Ein minniluti, Jógvan Skorheim og Jákup F. N. Mikkelsen, mælir til at taka undir við at skipa skúlan við einari leiðslu – hetta sambært uppskoti frá Mentamálaráðnum 11. februar 2011.
Ein minniluti, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur og Óluva Klettskarð, tekur ikki undir við at skipa skúlan við einari leiðslu, sum skotið verður upp frá Mentamálaráðnum 11. februar 2011.
Ein minniluti, Atli S. Justiniussen, tekur støðu í býráðnum.

Á fundi 18. mai 2011 beindi Fíggjarnevndin málið í býráðið.

Býráðsins samtykt:
Broytingaruppskot frá Signhild V. Joensen, Jógvan Skorheim, Jákup F. N. Mikkelsen og Auðunn Konráðsson, dagfest 24.05.2011, um at taka undir við einari skúlaleiðslu í Klaksvík, vísandi til uppskot frá Mentamálaráðnum, men við nøkrum broytingum og eitt ára útseting til 2012, fall við 4 atkvøðum fyri (Auðunn Konráðsson, Jógvan Skorheim, Signhild V. Joensen og Jákup F. N. Mikkelsen) og 7 atkvøðum ímóti (Óli M. Lassen, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, Atli S. Justinussen, Gunvá við Keldu, Eyðun Jacobsen, Óluva Klettskarð og Jákup Skoradal).

Tilmælið frá minniluta í Mentanarnevndini um at taka undir við at skipa skúlan við einari leiðslu sambært uppskoti frá Mentamálaráðnum 11. februar 2011, fall við 1 atkvøðu fyri (Jákup F. N. Mikkelsen) og 7 atkvøðum ímóti (Óli M. Lassen, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, Atli S. Justinussen, Gunvá við Keldu, Eyðun Jacobsen, Óluva Klettskarð og Jákup Skoradal). Auðunn Konráðsson, Jógvan Skorheim og Signhild V. Joensen atkvøddu ikki.

Tilmælið frá minniluta í Mentanarnevndini, um ikki at taka undir við at skipa skúlan við einari leiðslu, varð síðan samtykt við 7 atkvøðum fyri (Óli M. Lassen, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, Atli S. Justinussen, Gunvá við Keldu, Eyðun Jacobsen, Óluva Klettskarð og Jákup Skoradal) og 4 ímóti (Auðunn Konráðsson, Jógvan Skorheim, Signhild V. Joensen og Jákup F. N. Mikkelsen).

2011/056.
<u>10/00892 P-pláss oman fyri bátabrúgvarnar, eykajáttan – *2. viðgerð*</u>

Býráðið samtykti málið fyrru ferð á býráðsfundinum 26. apríl 2011.

Fíggjarnevndin mælti á fundi 18. mai 2011 býráðnum til at samtykkja málið seinnu ferð.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.
Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli, vegna ógegni.

2011/057.
<u>08/00149 Um- og nýbygging, Ósaskúlin – talgildar talvur og møblar til 3. byggistig – *2. viðgerð*</u>

Býráðið samtykti málið fyrru ferð á býráðsfundinum 26. apríl 2011.

Tekniska Nevnd hevði á fundi 11. mai 2011 málið til kunning.

Mentanarnevndin hevði á fundi 11. mai 2011málið til kunning.

Fíggjarnevndin mælti á fundi 18. mai 2011 býráðnum til at samtykkja málið seinnu ferð.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/058.
<u>08/00149 Bygging av nýggjum Ósaskúla (eykajáttan 2010 – *vantandi 2. viðgerð*)</u>

Býráðið samtykti málið fyrru ferð á býráðsfundinum 25. november 2010.

Í sambandi við nevndu býráðssamtykt greiddi býarverkfrøðingurin frá í skrivi, dagfest 29. okt. 2010, at byggingin av Skúlanum við Ósanna gekk sum ætlað, men at tað vísti seg, at reguleringin av upprunaliga samtyktu íløguavsetingini, úr 18 mió. kr. niður í 15 mió. kr. í 2010 ikki helt, tí byggingin og tíðarætlanin kravdi, at 17 mió. kr. vóru tøkar í 2010. Tørvur var sostatt á einari eykajáttan uppá 2 mió. kr. Vísandi til omanfyristandandi mælti TU tá til, at býráðið økti íløgujáttanina til Skúlin við Ósánna við 2 mió. kr. til byggiarbeiðið í 2010. Sí skjal dagf. 29. okt. 2010.

Sum tað framgongur omanfyri, samtykti býráðið hesa eykajáttan fyrru ferð á býráðsfundinum 25. nov. 2010. Eftir røttum skuldi seinna samtykt síðan verðið gjørd í desember 2010, men málið varð ikki lagt fyri aftur.

Tekniska Nevnd hevði á fundi 11. mai 2011 málið til kunning.

Mentanarnevndin hevði á fundi 11. mai 2011málið til kunning.

Fíggjarnevndin mælti á fundi 18. mai 2011 býráðnum til at samtykkja málið seinnu ferð, samstundis sum mannagongdin á økinum verður strammað upp fyri at tryggja nøktandi viðgerðir av málum, sum krevja tvær viðgerðir.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/059.
<u>09/00879 Innrætting av hjallaranum í Sambýlinum á Heygnum – *2. viðgerð*</u>

Býráðið samtykti málið fyrru ferð á býráðsfundinum 26. apríl 2011.

Fíggjarnevndin mælir á fundi 18.mai 2011 býráðnum til at samtykkja málið seinnu ferð.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/060.
10/00002 Stovnsetan av NSR-tænastu í Norðoyggjum – *2. viðgerð*

Býráðið samtykti málið fyrru ferð á býráðsfundinum 26. apríl 2011.

Fíggjarnevndin mælir á fundi 18. mai 2011 býráðnum til at samtykkja málið seinnu ferð.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/061.
09/00315 Bygging av røktarheimi (eykajáttan 2010 – *vantandi 2. viðgerð*)

Býráðið samtykti málið fyrru ferð á býráðsfundinum 25. november 2010.

Í sambandi við nevndu býráðssamtykt greiddu sosialnevndarleiðarin og býarverkfrøðingurin frá í skrivi, dagfest 29. okt. 2010, at kommunan í 2010 hevði avsett 5 mió. kr. (brutto) til verkætlanina og roknaði við at fáa 2 mió. kr. frá Almannamálaráðnum. Men við tað at studningslán bert fevnir um bygging, arkitekt/ráðgeving og naglafast innbúgv (tvs. ikki byggibúning) komu umleið 2 mió. kr. at resta í, um eingi tiltøk vórðu sett í verk. Tørvur var sostatt á einari eykajáttan uppá 2 mió. kr. Vísandi til omanfyristandandi mælti umsitingin tá til, at býráðið økti íløgujáttanina til røktarheimið við 2 mió. kr.

Sum tað framgongur omanfyri, samtykti býráðið hesa eykajáttan fyrru ferð á býráðsfundinum 25. nov. 2010. Eftir røttum skuldi seinna samtykt síðan verðið gjørd í desember 2010, men málið varð ikki lagt fyri aftur.

Sosiala Nevnd hevði á fundi 11. mai 2011 málið til kunning.

Fíggjarnevndin mælir á fundi 18. mai 2011 býráðnum til at samtykkja málið seinnu ferð, samstundis sum mannagongdin á økinum verður strammað upp fyri at tryggja nøktandi viðgerðir av málum, sum krevja tvær viðgerðir.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/062.
11/00229 Avseting til býarplansarbeiði – *2. viðgerð*

Býráðið samtykti málið fyrru ferð á býráðsfundinum 22. mars 2011.

Fíggjarnevndin mælir á fundi 18. mai 2011 býráðnum til at samtykkja málið seinnu ferð.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

Frammanfyri standandi mál eru viðgjørd á almennum fundi.

Fundurin lokin kl. 20:15.